## Ronaldinho fer ongan veg

Forsetin í Barcelona, Joan Laporta, avsannar nú søgurnar um, at Ronaldinho kann verða seldur í januar mánaði. – Vit hava ongar ætlanir um at selja hann, og vit hava ikki frætt frá nøkrum liði, sum ætlar sær at keypa hann, segði hann eftir dystin hjá Barcelona móti Deportivo la Coruna sunnudagin. Seinastu vikuna hevur annars ljóða, at bæði Chelsea og AC Milan hava roynt at tryggja sær brasilsku stjørnuna.



## Mourinho neyvan landsliðsvenjari

Sambært enskum miðlum verður tað ikki Jose Mourinho, sum verður settur í tøka enska landsliðsvenjarasessin. 44 ára gamli portugisin hevur annars staðið ovastur á ynskislistanum hjá enska fótbóltssambandinum, men nú ljóðar, at hann ístaðin er ávegis til eitt europiskt stórfelag. Úr enska fótbóltssambandinum eru boðini tó, at einki enn er avgjørt, og at tey ikki vilja nýta pressuna til sínar samráðingar. Líkamikið hvønn hesar eru við. Umfram Mourinho hava Fabio Capello, Jürgen Klinsmann og Marcello Lippi eisini verið settir í samband við enska landsliðsvenjarasessin.

Dráttur-SÍ 1-3 (25-23, 20-25, 14-25, 23-25)

# SÍ sveiggjar yvir hinum

**Um vikuskiftið var spurningurin, um SÍ kvinnurnar fóru at megna at koma út úr oyggjabrakinum við stigum í skjáttuni, og um mennirnar hjá sama felag mundu fara at gera nakað við sterka Mjølnir liðið í Klaksvík**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Stiman, ið sørvingar tykjast vera komnir í, man sigast at vera sera góð, tí onki lið stendur teimum mát.

Bæði í Meistaradeildini hjá kvinnum og monnum, er støðan tann, at oddaliðið er SÍ, hóast tað á kvinnusíðini er talan um ein deildan oddasess. Har eru tað ÍF kvinnurnar, ið eru argastu kappingarneytarnir hjá vágagellunum, og hava tær ein dyst á láni.

Í meistaradeildini hjá monnum var tað hesaferð Mjølnir, ið ætlaðu sær stig úr oddabrakinum, so at teir kundu leggja seg í góða FM-støðu.

Oddastríðið hevur staðið millum serliga hesi bæði liðini, og so hava ÍF havt hug at blanda seg uppí eisini.



*Sørvingar styrktu um sína støðu, tá teir vunnu oddadystin móti Mjølni*

### Dráttur dragnar

Í høllini á Giljanesi var spennandi oyggjauppgerðin í meistaradeildini hjá kvinnum spæld í vikuskiftinum, og samstundis ein uppgerð, har Dráttur helst skuldi fáa stig burturúr, til tess at halda seg uppi í oddastríðnum.

Dráttur byrjaðu eisini dystin rættuliga tendraðar, og løgdu út sum eitt ólogið. Við góðum servum, ágrítnum móttøkuspæli, fingu vertirnar lagt eitt trýst frá byrjan, og kantarnir høvdu nærum hug at fara á flog til tíðir. SÍ fótaði sær tó, aftaná trilvandi byrjanina, og var um reppið at vinna sær settið, men hepnið manglaði og fyrsta settið fór til heimaliðið. 25-23

Næsta settið er sum endin á tí fyrra. Karin Mikkelsen vísir servur á høgum støði, og samstundis eru móttøkurnar hjá Drátti byrjaðar at vilja út úr høllini, heldur enn niðan til hevaran. SÍ vinnur settið trygt 25-20.

Triðja sett byrjar katastofalt fyri Drátt, tí tær høvdu kanska gloymt at lagt lokið á pottin. SÍ nýttu ferð eftir ferð hugtakið at koyra í pottin, t.e. at bólturin verður skumpaður yvirum netið í eitt op millum leikararnar hinumeðna netið. Og áðrenn Dráttur fær fótað sær, er SÍ rokið avstað. Støðan var 14-4 tað einu løtuna. SÍ endar við at vinna settið 25-14.

Í fjórða setti vóru liðini sum hamskift, tí SÍ tóktist at hava lækkað ferðina á spælinum, og Dráttur sær sín møguleika, og roynir at taka av. Einu løtuna er heimaliðið eisini á odda 20-15, men so er tað sum um at SÍ hevur eitt undómskent eyka gervi, tí tær fingu vent settinum og tí eisini vunnið dystin. Endaliga settið varð 25-23 til SÍ.

### Oddabrakið í Klaksvík

Ein sannur gýsari lá í kortunum, tá Mjølnir og SÍ skuldu møtast í meistaradeildini hjá monnum.

Sum oddalið, nú hálvt FM er runnið, tóku SÍ sæti í stóru steypafinaluni á Hálsi í februar.

Í mun til Mjølnir, fekk SÍ eina trilvandi byrjan uppá dystin, og Mjølnir fóru settinum 25-20.

Men so tóktist tað sum um at kósin varð sett hjá gestunum úr Vágoynni, teir vunnu trygt í øðrum og triðja, ikki minst takkað verið framúrskarandi fjølbroytni í spælinum hjá Jóan Peturi á Stongum.

Í fjórða setti stóð á eina løtu, men har sýndu SÍ munin.

Ov nógvir feilir hjá heimaliðnum og ov sjálvdan sá man nakað til tað meistarliga spæl teir eru mentir at spæla. Møguliga var tað mótstøðuliðnum fyri at takka, at so var.

### Fram tikið seg úr

Ein dystur skuldi verið spældur í meistaradeildini hjá monnum í vikuskiftinum, og tað var dysturin millum havnarfelagið Fram og ÍF. Men frammanundan boðaði Fram, at teir hava valt at taka liðið úr kappingini. Hvat víðari hendir, hesum viðvíkjandi, er ilt at vita, men eyðsýnt er, at tað er serstakliga óheppið. Bert fimm lið byrjaðu kappingina í ár í bestu flogbóltsdeildini, og nú tað eina felagið hevur trekt seg aftur, eru bert fýra eftir.

Hendan ítrótt hevur trupulleikar at vinna fastaføtur ymsastaðni í landinum á mannfólkasíðuni, og tí er tað sera óheppið at slíkt kemur fyri, heilt uppi í bestu flogbóltsdeildunum. Hetta er ikki við til at økja um áhugan fyri ítróttini, og má tað sigast at vera synd.

Vónandi verður greiða funnin á málinum, so at man aftur kann fokusera á tað vakra og einfalda í spælinum.

## FAKTA

**Meistaradeild kvinnur:**

| Dato | Dystir | Úrslit |
|---|---|---|
| 8.12 | Dráttur-SÍ | 1-3 (25-23, 20-25, 14-25, 23-25) |
| 8.12 | ÍF-Mjølnir | 3-0 (25-14, 28-26, 25-20) |
| 9.12 | TB-Fleyr | 3-2 (25-14, 25-6, 21-25, 22-25, 16-14) |

**Meistaradeild menn:**

| | | |
|---|---|---|
| 8.12 | Fleyr-ÍF | 1-3 (15-25, 25-18, 24-26, 24-26) |
| 8.12 | Mjølnir-SÍ | 1-3 (25-20, 20-25, 18-25, 22-25) |
| 9.12 | Fram-ÍF | (Ikki spældur, orsakað av at Fram hevur tikið liðið úr meistaradeildini, og tað má sigast at vera sera óheppið.) |

RUKO LÁSATÆNASTA
Ruko
• Umleggja alt til sama lykil
• Vit kopiera lyklar
• Útvega allar lásakassar
• Útvega lásasystem
Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20

Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu
FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir
Hjálparfólki til breyðsøludeildina
at byrja skjótast til ber
Vit sóknast eftir einum røskum fólki, við góðum røkiskapi og áræði, til fast starv í einum handli, sum lív altíð er í.
Arbeiðsuppgávur:
At røkja starvið sum hjálparfólk í breyðsøludeild okkara.
Arbeiðstíð:
Um 25-30 tímar um vikuna, (3/4 tíð), harav annan hvønn leygardag fyrrapart
Vit rokna við, at tú ert:
· Røkin
· Blíðlig/ur av lyndi
· Álítandi
· Fleksibul
· Trívist væl við nógvum og fjølbroyttum uppgávum
Løn:
Smbrt. S & K sáttmálanum
Send okkum nøkur orð um teg sjálva/n til:
Keypssamtøkan
í Dr. Jakobsensgøtu
Postsmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20
Att.: Bo Møller
Fartel 217593